# VILT INNI HJÁ LASSA OG TURID

200 **RÁDÝRSSKØLTAR** OG EINI 20 ÚTSTAPPAÐI **DJÓRAHØVD** PRÝÐA VEGGIRNAR Í STOVUNI HJÁ LISTAMANNINUM **LASSA SØRENSEN** OG KONUNI TURID Í SØRVÁGI.
– EG HEVÐI IKKI FUNNIÐ UPPÁ AT HONGT NAKAÐ Á VEGGIN, SUM EG IKKI SJÁLVUR HEVÐI **SKOTIÐ**, SIGUR LASSE.



**HEIM**

**Inna Törnroos**
inna@sosialurin.fo

Lasse Sørensen er føddur í Danmark, men hevur búð í Føroyum síðan 1960. Hann er kendur fyri sínar vøkru tekningar og málningar av náttúru og dýrum í Føroyum og uttanlands.

Tann síðan av Lassa, sum kanska ikki er so kend, er veiðumaðurin Lasse.

Skøltarnir, sum hanga á langa vegginum í stovuni eru frá 1965 og fram til 2009. Á hvørjum ári er Lasse í Danmark til rádýraveiðu, og hvørt einasta rádýr endar á vegginum.

– Tá eg hyggi á veggin, minnist eg aftur á, hvussu tað var á teimum ymisku veiðuferðunum, greiður hann frá.

Á vegginum undir liðini av skøltunum, er eitt stórt høvd av eini antilopu, ið Lasse skjeyt á eini ferð til Suðurafrika 1988.

### Barnaheimið

Húsið, sum hjúnini búgva í, er barnaheimið hjá Turid. Uppruna húsini stóðu klár í 1934, men tá Lasse og Turid fingu børn, var bygt uppí. Nú eru heili seks kømur á loftinum.



*Zebraskinnið er frá veiðuferðini í Suðurafrika 1988*

Børnini eru vaksin og búgva bæði í Danmark.

Turid hevur arbeitt sum lærari í Sørvágs skúla í nógv ár. Hon nýtir tey nógvu hornini at hanga jólapynt á, nú jólini nærkast og dótturin við maka kemur heim.

– Tá antilopan kom í túnið, mundi eg svímað. Kassin var so øguliga stórur, so eg skilti slettis ikki hvat tað var, sum var í, fortelur Turid.

Hon hevur verið við á nógvum veiðuferðum, men ongantíð skotið nakað sjálv.

Sonurin Jákup hevur arvað veiðuáhugan frá pápa sínum, og starvast nú við at vísa hvussu ein flettur og haggreiður djór.

– Tað løgna er, at Jákup felldi sítt fyrsta rádýr á sama staði, har eg felldi mítt fyrsta í 1965, greiður Lasse frá.

Tey nógvu veiðuminnini í heiminum eru ikki har, tí Lasse vil reypa av sær sjálvum.

– At vera veiðumaður er ein »lidenskabur« og ein áhugi, og tí vil man minnast aftur á tað, greiður hann frá.

Áhugin hevur eisini givið seg til kennar í 19 bókumm um náttúru og djóralív, og nógvar greinar í donskum, føroyskum og altjóða tíðarritum um veiðulív.

▶